## Einki bjarnabann

Tað eydnaðist ikki USA at fáa altjóða samfelagið at banna øllum handli við ísbjarnaúrdráttum. Amerikanska stjórnin legði uppskotið fram á fundinum hjá ST-felagsskapinum CITES, sum umsitur hótt djórasløg, men tað fall. Serliga Noreg, Kanada og Grønland vóru ímóti uppskotinum um handilsbann. Amerikanarar vilja vera við, at ísbjørnin er eitt hótt djóraslag, men tað hildu tey flestu londini ikki. Hildið verður, at millum 20.000 og 25.000 ísbjarnir eru í økinum kring Norðpólin, og talið hevur verið minkandi.



## Forða ikki íslendingum

Niðurlendska stjórnin ætlar sær ikki at leggja forðingar í vegin fyri, at ES kann taka upp samráðingar við Ísland um limaskap í samveldinum. Niðurlendskir talsmenn hava fyrr nevnt, at landið kanska fór at forða samráðingunum, til semja var fingin um Icesave-skuldina, men niðurlendski uttanríkisráðharrin, Maxime Verhagen, segði í gjár, at Niðurlond fara ikki at forða samráðingunum. Ráðharrin legði tó afturat, at Ísland kann ikki fáa limaskap í ES, fyrr enn ósemjan um Icesave-skuldina er loyst, tí Niðurlond skulu hava pengarnar aftur, segði hann.

# Útbúgving er svarið

**Allir luttakararnir í venjingini í Vágatunlinum vóru skjótir á staðið við røttu útgerðini, sigur Per Teglgaard, venjingarleiðari. Hann sigur tó, at sum í øllum venjingum vórðu mistøk gjørd, og tey kunnu bara rættast við útbúgving og venjing**

TILBÚGVING
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*



*Mistøk henda altíð í slíkum venjingum. Tað er bara ein máti at minka um mistøkini, og tað er við útbúgving og venjingum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Hósmorgunin klokkan 11 hittust fyriskipararnir av venjingini í Vágatunlinum mikukvøldið til eftirmetingar, og aftaná tann fundin góvu Per Teglgaard, venjingarleiðari og Uni Danielsen, stjóri fyri tunnilin sær stundir til at gera nakrar viðmerkingar.

Tað var ein sera trupul venjing, tí tvey skaðastøð vóru, og bæði skuldu hava hjálp í senn, sigur Per Teglg aard.

Hann sigur, at ásettu tíðirnar hildu, og allir luttakararnir vóru skjótir á staðið við røttu útgerðini.

Ellivu dómarar vóru við, og út frá teirra viðmerkingum og tí, sum sagt varð á eftirmetingarfundinum, verður nú ein frágreiðing skrivað. Henda frágreiðing verður liðug í seinasta lagi um ein mánað.

Per Teglgaard dámar væl, at Vágatunnilin eins og Norðoyatunnilin hevur slíka stóra venjing fimta hvørt ár. Inn ímillum eru smærri venjingar.

- Tá ið so nógvur peningur varð settur av til hesa venjingina, settu vit okkum fyri at lata tey arbeiða undir hægsta trýsti, sigur Per Teglgaard.

### Sæð størri mistøk

Hann vil ikki siga, hvørji mistøk vórðu gjørd, men tað slepst ikki undan, at okkurt ikki gongur væl. Menniskjalig mistøk kunnu verða gjørd, og útgerð kann ganga fyri. Mistøkunum ber til at læra nakað av, sigur Per Teglgaard. Hann hevur í sínum lívi verið til nógvar venjingar, og hann sigur seg hava sæð størri mistøk gjørd enn í venjingini mikukvøldið.

Uni Danielsen heldur, at vit ikki mugu gloyma tað góða í, at so nógv fólk í tí dagliga eru til reiðar at arbeiða sjálvboðin. Tað gera fleiri sløkkiliðið og bjargingarfeløgini.

Per Teglgaard hevur eisini rós at geva sløkkiliðsfólkunum og sjúkrabilafólkunum.

Fólkini, sum spældu særd í venjingini, vórðu biðin um aftaná at skriva tl fyrireikararnar um, hvussu tey upplivdu venjingina.

### Fingu góða hjálp

- Øll lótu líka væl at. Tey fingu góða fyrstuhjálp í bussinum, sjúkrabilafólkini tóku sær væl av teimum og dugdu væl at greiða teimum frá, hvat hendi, til dømis, meðan tey sótu føst í einum bili, sum skuldi skerast upp, sigur Per Teglgaard.

Hann sigur, at øll gingu líka høgt upp í venjingina, og tað lýsir hann við einum dømi.

Tá ið venjingin varð steðgað fyrr enn ætlað, gav hann boð um hetta. Men ein maður vildi ikki. Nú var ikki at steðga, segði hann.

- Tað dømið fari eg at taka við mær at brúka onkra aðrastaðni.

Mátin at sleppa undan at fleiri mistøk verða gjørd, er at útbúgva fólkini í tilbúgvingini meira. Útbúgving, útbúgving og aftur útbúgving. Og so regluligar venjingar.

Hetta eru Per Teglgaard og Uni Danielsen fullkomiliga samdir um.

# Litrik barnalist til fram fyri Haiti

**Børn í Eysturkommunu funnu sjálv uppá at gera eina listaframsýning til frama fyri Haiti**

NEYÐHJÁLP
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Í gamla Føroya Banka í Leirvík verður sunnudagin ein serlig framsýning.

Tað eru børn, sum læra myndlist hjá Saminu Poulsen, sum hava hesa framsýning. 14 børn í Eysturkommunu.

Sabina Poulsen, sum býr í Gøtu, hevur búð í fýra ár í Føroyum.

Hon fekk hugskotið at faraat undirvísa børnum í myndlist, tí flestu børn spæla fótbólt ella hava annað bóltspæl, og tey hevði verið gott fyri tey at gjørt okkurt annað eisini, helt Sabina Poulsen, sum er útbúgvin listterapeutur.

Hon sigur, at børnini komu sjálv við hugskotinum at hava eina søluframsýning og lata peningin sum hjálp til Haiti.

Børnini vóru ógvuliga hugagóð, og tey avgjørdu sjálv, hvat tey skuldu mála.

Foreldrini hava eisini tikið væl undir við tiltakinum.

Leiðarin og børnini hava sjálv tikið avgerðina um, hvat myndirnar skuldu seljast fyri. Tað er betri fyri børnini, enn um fólk komu inn og bjóðaðu, heldur Sabina Poulsen.

Framsýningin verður opin sunnudagin frá klokkan 16 til 19, tá kvøldskúlaframsýningin eisini verður.

